gult cyan magenta svart



# TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hansen, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

## LØGREGLAN

Eg eri ein sera ónøgd og ótrygg mamma sum búgvi á Gundadalsvegnum. Hvønn dag skulu vit fleiri ferðir tvørtur um tann breiða vegin, fyri at koma til og frá okkara bili. Eg havi 3 børn og sjálvandi havi eg eisini fullar hendur av taskum, vøruposum og ymiskum øðrum, at sleipa uppá, tá vit skulu yvir um tann breiða vegin. Av tí sama havi eg ikki líka góðar møguleikar at verja míni børn móti bilunum, sum koma súsandi framvið. Tað, sum eg eri sera ónøgd við, er at fyri eini tíð síðani, vórðu parkeringsforboðsskelti sett upp á báðum síðum á tí breiða Gundadalsvegnum. Mær er sagt, at tað er fyri parkeringsóskilið, sum er tá fótbóltsdystir eru um summarið og fyri býbussunum. Eg eri í teirri støðu, at hava keypt hús í Gundadali og havi ikki mítt egna parkeringspláss. So eru mínir spurningar. 1. Er tað ikki so, at tað skal vera parkeringspláss til hvørt hús? Eigi eg at gera tað sjálv, bróta mín garð niður? 2. Hevði tað ikki verið eitt gott hugskot, at parkeringsforboð var eina tíð um vikuna/árið, kanska í fótbóltstíðini um vikuskiftið/summarið? 3. Hvat við bert at seta parkeringsforboð í niðaru síðu á Gundadalsvegnum, tí hann er jú ivaleysa breiður? 4. Tað verður so nógv tosað um ferðslutrygd og nú má eg spyrja, hvar tryggleikin er, tá eg skal við børnunum yvir um tann breiða vegin hvønn dag, fleiri ferðir um dagin, oman á ta stóra almenna parkeringsplássið, klatra upp og niður gjøgnum bakkan/grasið, sum eg nokk heldur ikki havi loyvi til? 5. Hví ikki seta parkeringsforboðskelti upp, t.d. frá P.E. Kolonial og yvir til Eysturskúlan, hvar vegurin er so smalur og bilar standa alla staðni framvið vegnum. Tað er eitt virvar av tí aðru verð um morgunin, tá ein skal koyra børnini í skúla?

*Um tað skal vera parkeringspláss til hvørt hús er ein spurningur, sum kommunan kann geva spyrjaranum svar uppá. Tað er helst spurningur um, hvat stendur í skeytinum til grundstykkið.*

*Viðvíkjandi parkeringsforboðnum á Gundadalsvegi, var í juni 1999 avgjørt í ferðslunevndini í Havn, at parkeringsforboð skuldi setast upp á Gundadalsvegnum. M. a. var hugsað um ferðsluna kring fótbóltsvirksemið/barnavirksemið. At bilar standa parkeraðir og børn og onnur skulu út á og tvørtur um vegin millum parkeraðar bilar er ikki ferðslutrygt. Tá eingir bilar standa parkeraðir, er útsýnið betri, tá farast skal tvørtur um vegin. Annars eru fleri gonguteigar á Gundadalsvegnum.*

*Vit hava ikki fingið áheitanir um parkeringsruðuleika frá Fútalág til Eysturskúlan. Men greitt er, at býurin er í vøkstri og ferðslan økist alsamt.*

*Tá tey flestu, sum koyra børn síni í skúla, koma beint áðrenn skúlatíðin byrjar kl. 0800, ja so má ruðuleiki standast av hesum. Um farið var frá húsum 5-10 min. fyrr, var trupulleikin kanska ikki so stórur.*

*Annars er mál viðvíkjandi ferðsluni eftir Skúlagøtu og við Eysturskúlan reist, og verður viðgjørt í ferðslunevndini.*

## FØÐSLU- OG HÚSARHALDSFRØÐINGURIN

Nú krím og sjúkur herja land og ríki, kundi eg hugsað mær at fingið nøkur góð ráð um góðan kost, soleiðis at betur kann standast ímóti alskyns smittum. Eg hugsi um serliga vitaminríkt grønmeti, frukt og annan kost, sum vit kunnu eta hvønn dag. Hvat er best at geva børnunum, tey eru ring at fáa at eta grønmeti, men er eitt ella annað grønmeti, sum er serliga gott og sum gagnar – flest – børnum væl?

*Skal maturin verða sunnur og góður er tað sera umráðandi, at maturin er fjølbroyttur, ikki ov feitur, at epli og breyð serliga rugbreyð verður etið hvønn dag, at mjólk og mjólkaúrdráttir hava eitt lágt feittinnihald, at viðskerðin er soltin og at frukt og grønmeti verða etið hvønn dag. Felags fyri frukt og grønmeti er, at hesi hava eitt sera lágt kaloriu/Kj-innihald, men eitt høgt innihald av vitaminum og mineralum, sum jú er gott fyri okkara verjuskipan. Fyri vaksin verður tilrátt at eta 600 gr. av frukt og grønmeti um dagin, fyri børn millum 4 og 10 ár 400 gr. Kanningar vísa, at um fylgt verður tilráðingunum, so minkar vandin fyri at fáa krabbamein og hjarta- og karsjúkur.*

*Øll frukt og alt grønmeti er gott, men best er at lata árstíðirnar avgera, hvat fyri slag vit skulu eta. Tí jú nýggjari fruktin ella grønmetið er, jú størri er vitamininnihaldið. Vitaminir tola ofta lítið av, og ein stórur partur oyðilegst, um maturin verður stoktur ella kókaður ov leingi. Best er at dampkóka grønmeti.*

*Tað kann ofta verða torført at venja børn við nýggjar matvanar. Best er at gera hetta í smáum stigum. Ein góður háttur er eisini at hava børnini meira við í matgerðini. Og á tann hátt vekja teira áhuga í nýggjum rávørum. Tað vísir seg ofta, at um børnini hava verið við í matgerðini, so eru tey meir áhugað í at royna matin.*

## LØGFRØÐINGURIN

Eigi eitt grundøki, sum eg søkti um byggiloyvi til í 1988, tí sonurin skuldi byggja á økið. Byggiloyvi varð játtað galdandi í eitt ár. Grundøkið er 1262 fermetrar til støddar, so eg skuldi gjalda fyri veg og kloakk, sum tá var í mesta lagi 22.500,- kr. umframt 636,- kr. fyri málsviðgerð ella 23.135 kr. tilsamans. Nú hendir tað, at sonurin finnur sær gentu, sum eigur hús, so byggingin verður av ongum. Í dag er veg- og kloakkgjaldið hjá kommununi uml. 50.000,- kr. Eg ynski at selja grundøkið, og havi spurt meg fyri hjá kommununi, um eg kann lýsa grundøkið til sølu, og siga, at goldið er fyri veg og kloakk, men eg fái ikki nakað beinleiðis svar, men tekniska umsitingin sigur bert, at gjaldið nú er 50.000 kr. Spurningurin ljóðar. Havi eina ferð goldið fyri veg og kloakk, kann kommunan nú krevja meg, ella tí eg selji til, eftir meirgjaldinum (veg- og kloakkgjald í dag uml. 50.000-22.000=28.000 kr.) Tað eru 12 og eitt hálvt ár síðani eg rindaði pengarnar kr. 22.000 til kommununa, og hevur kommunan fingið nyttu av hesum peningi, tí kr. 22.000 í dag er ikki tað sama, sum 22.000 kr. í 1988. Mín áskoðan út frá einum logiskum sjónarmiði er, at tá ein hevur goldið fyri nakað og hevur kvittan fyri tað, skal kann ein ikki krevjast eftir einum meirgjaldi 12 og eitt hálvt ár aftaná.

*Í svarinum gangi eg út frá, at kommunan hevur loyvi at krevja veg- og kloakkgjald frá tygum. Hvussu støðan er millum tygum og kommununa er fyrst og fremst treytað av, hvat avtalað er tykkara millum. Hesa avtalu havi eg ikki kunnleika til, og fái eg tí ikki svarað, hvussu mál tygara skal avgerast. Tó vil eg viðmerkja, at tað kann hava týdning, hvørt kommunan hevur havt skyldu til at gjørt ella longu hevur gjørt umrødda veg- og kloakkarbeiði. Um hetta ikki er so, vil eg meta, hetta vísandi til at byggiloyvið er útgingið, og tygum tí eru noyddur at søkja um nýtt byggiloyvi, og vísandi til at kostnaðurin til veg- og kloakk helst er størri í dag, at kommunan kann krevja tað veg- og kloakkgjald sum nú er galdandi, tað vil siga kr. 50.000,00.*

## MÁLFRØÐINGURIN

Kann málfrøðingurin geva mær eina frágreiðing um, hví tað verður sagt »gøtudanskt«?

*Danskt var sum kunnugt almenna málið í Føroyum í fleiri øldir. Tað var kirkjumál, rættarmál, skúlamál o.s.fr., men vanliga talumálið í Føroyum hevur altíð verið føroyskt. Føroyingar flestir høvdu tí rættiliga lítið samband við danskt talumál. Áðrenn skúlagongd gjørdist vanlig, mundi mesta sambandið við danskt talumál vera í kirkjuni, og tá var tað ofta lisið upp av føroyingi, sum neyvan hevði nógv størri kunnleika til danska talu enn føroyingar flestir. Tá ið føroyingar tosaðu danskt, vóru bæði orðatilfeingið, setningsbygnaðurin og framburðurin tí, sum vera man, rættiliga nógv ávirkað av føroyskum. Hetta serliga frábrigdi av donskum nevna vit gøtudanskt.*

*Onkur hevur hildið, at orðið gøtudanskt kann sipa til, at hetta er danskt mál, sum føroyingar tosaðu »úti á gøtunum«. Tá verður kanska eisini hugsað um danska orðið gadesprog »óvandamál«. Men tað er lítið hugsandi, tí vanliga talumálið hjá føroyingum var føroyskt, og danskt varð fyrst og fremst brúkt í sambandi við átrúnað og í samskifti við myndugleikarnar. Ein annar møguleiki er, at orðið hevur samband við bygdarnavnið Gøta. Og sagt verður frá manni, ið var ættaður úr Gøtu, sum plagdi at tosa danskt, nógv blandað við føroyskum, eisini í vanligum samskifti. Eftir honum varð hetta blandingsmálið so nevnt gøtudanst. Og tað er kanska ikki heilt óhugsandi, tí tað man hava tókst føroyingum flestum løgið, at føroyingur tosaði danskt við teir um vanlig gerandismál, ikki minst um førleikin í donskum ikki var tann besti.*

**Spurnarkassin**

**– tit spyrja vit svara**

**Hvønn mikudag**
**í Sosialinum**

**Spyrjið serfrøðingarnar**

**Hava tit spurningar**
**til serfrøðingarnar,**
**kunnu tit senda teir til:**

**Sosialin**
**postsmogu 76**
**110 Tórshavn**

**ella á fax: 314720**

**ella teldupost:**
**spyr@sosialurin.fo**

**Minnist til at merkja, hvørjum tit seta spurningin**

gult cyan magenta svart



# *Gjestal Nagano - Siljla Superwash*

**Uppskriftin hesa vikuna**

## Barna troyggja

| **Størrelser:** | | 1 | 2 | 4 | 6 | 8 | år |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** | | | | | | | |
| (plaggets mål) | Ca | 65 | 71 | 75 | 80 | 85 | cm |
| **Hel lengde:** | Ca | 36 | 38 | 42 | 46 | 50 | cm |
| **Uermslengde:** | Ca | 19 | 21 | 25 | 28 | 32 | cm |

**MATERIALER: Gjestal Nagano (100% superwash ull), nøster à 50 g.**
**Kan også strikkes i Silja Superwash (80% superwash ull, 20% nylon), nøster à 50 g.**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| blått nr. 307 eller hvitt nr. 317 = bunnfargen | ca. | 3 | 4 | 4 | 5 | 6 | nøster |
| korallrødt nr. 346 = mønsterfarge 1 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |
| hvitt nr. 317 eller blått nr. 307 = mønsterfarge 2 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |
| lyse gult nr. 316 = mønsterfarge 3 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |
| marineblått nr. 306 = mønsterfarge 4 | ca. | 1 | 1 | 2 | 2 | 2 | nøster |
| lyse grønt nr. 362 = mønsterfarge 5 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |

**Beregn 1 nøste ekstra av marineblått nr. 306 til høy hals.**
**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3 eller 3½. Liten rundp nr. 2½ til halsen.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 26 m glattstrikk og mønster i bredden og 32 omg i høyden på p nr. 3 eller 3½ måler 10 x 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**Bolen**
Legg opp 152-164-176-188-200 m med mønsterfarge 4 på rundp nr. 2½ og str 4-5-5-6-6 cm rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr. Skift til rundp nr. 3 eller 3½ og glattstr. Str 2 omg med bunnfargen hvor det på 2. omg økes jevnt fordelt til 168-184-196-208-220 m. Str mønsterbord I etter diagrammet. Videre str glattstr med bunnfargen rett opp til arb måler ca. 17-20-23-28-31 cm. Sett en merketråd i hver side, den ene ved omg beg, den andre i motsatt side etter 84-92-98-104-110 m. Fell 10 m i hver side (5 m på hver side av merketråden). Legg arb til side og str ermene.
**Ermene:** Legg opp 36-38-40-42-44 m med mønsterfarge 4 på strømpep nr. 2½ og str vr-bord som på bolen. Skift til strømpep nr. 3 eller 3½ og glattstr. Str 2 omg med bunnfargen hvor det på 2. omg økes jevnt fordelt til 54-56-58-60-62 m. Str mønsterbord I etter diagrammet, videre str rett opp med bunnfargen til arb måler ca. 19-21-25-28-32 cm - eller til ønsket lengde opp til bærestykket. **Samtidig økes** 2 m midt under ermet på ca. hver 5. omg til det i alt er 68-72-78-84-90 m i omg. Fell 10 m midt under ermet (de 5 første og de 5 siste m i omg). Legg arb til side og str det andre ermet likt.
**Bærestykket:** Sett alle delene inn på samme rundp nr. 3 eller 3½ slik: Det ene ermet, forstykket, det andre ermet og ryggen. Sett en merketråd ved omg beg mellom rygg og venstre erme. La denne merketråden følge med oppover = 264-288-312-336-360 m. Str 0-2-4-6-8 omg med bunnfargen. Str mønsterbord II etter diagrammet. Når mønsteret er str ferdig, settes et merke midt foran og plagget str høyere bak slik: Str frem og tilbake i glattstr med bunnfargen. Str til det er 2-3-4-5-6 m igjen til merket foran, snu, ta 1 m løs av ved snuingene og str til det er 2-3-4-5-6 m igjen på den andre siden, snu og str til det er 6 m mindre igjen for hver gang. Str slik i alt 4 ganger i hver side. Str videre halsen rundt over alle m. **Men** fell jevnt fordelt til 86 m for 1 år, 90 m for 2 år, 94 m for 4 år, 98 m for 6 år og 102 m for 8 år. Str 2 omg med bunnfargen og str videre:
**Rund hals:** Skift til liten rundp nr. 2½ og str 5-5-6-6-7 cm rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr i mønsterfarge 4. Fell løst av i vrangbordstr. Brett kanten dobbelt mot vrangen og sy den til med løse sting.
**Høy hals:** Str rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr i mønsterfarge 4 på p nr. 2½ til halsen måler ca. 4 cm, skift til p nr. 3 eller 3½, snu arb slik at r-siden kommer ut når halsen brettes utover. Str til arb måler ca. 10-12-13-14-15 cm. Fell av i vrangbordstr til en pen, jevn kant som ikke strammer.
Sy eller mask sm under ermene.



**LUE I** (pikelue)

| **Størrelser:** | **ca.** | **1/2** | **4/6/8 år** |
|---|---|---|---|
| **Materialer: Gjestal Nagano eller Silja** | | | |
| hvitt nr. 317 = bunnfargen | ca. | 1 | 1 nøste |
| marineblått nr. 306 = mønsterfarge 4 | ca. | 1 | 1 nøste |

Rester fra genseren i de øvrige mønsterfargene.
**Pinner:** Strømpep nr. 2½ og 3 eller 3½ (eventuelt rundp nr. 2½ og 3 eller 3½).

Legg opp 108-120 m med mønsterfarge 4 på p nr. 2½. Str ca. 2 cm rundt i glattstr, 1 omg vr (= brettekant) og ca. 2 cm glattstr. Skift til p nr. 3 eller 3½ og str mønsterbord I, 2 ganger etter diagrammet, str 3 omg med bunnfargen hvor det på 1. omg økes jevnt fordelt til 120-130 m. Str mønsterbord III etter diagrammet. Sett et merke for hver 24.-26. m (= 5 merker). Str videre i glattstr med bunnfargen og øk 1 m på hver side av merket på hver omg 4 ganger (= 160-170 m i omg). På neste omg felles slik: Str 2 m vridd r sm før merket og 2 m r sm etter merket på hver 2. omg til 10 m igjen i omg. Klipp av garnet og trekk det gjennom de resterende m. Lag 5 små dusker i forskjellige farger og sett en i hver "spiss". Brett inn og sy pent til brettekanten.

**TOPPLUE II** (guttelue)

| **Størrelser:** | **ca.** | **1/2** | **4/6/8 år** |
|---|---|---|---|
| **Materialer: Gjestal Nagano eller Silja** | | | |
| blått nr. 307 = bunnfargen | ca. | 1 | 1 nøste |
| marineblått nr. 306 = mønsterfarge 4 | ca. | 1 | 1 nøste |

Rester fra genseren i de øvrige mønsterfargene.
**Pinner:** Strømpep nr. 2½ og 3 eller 3½ (eventuelt rundp).

Legg opp 108-120 m med mønsterfarge 4 på p nr. 2½. Str ca. 2 cm rundt i glattstr, 1 omg vr (= brettekant) og ca. 2 cm glattstr, skift til p nr. 3 eller 3½ og str mønsterbord I etter diagrammet, str 3 omg med bunnfargen hvor det på 1. omg økes jevnt fordelt til 120-130 m. Str mønsterbord III. Str videre med bunnfargen til arb fra brettekant måler ca. 11-12 cm. Fell på neste omg slik: Str 10-11 m r, 2 m r sm, str 1 omg uten fellinger. På neste omg str: 9-10 m r, 2 m r sm, gjenta fellingene på hver 2. omg og med 1 m mindre mellom fellingene for hver fellingsomg til 10 m igjen. Klipp av garnet og trekk det gjennom de resterende m. Sy pent til brettekanten og lag en dusk og fest i toppen på luen.

| **VOTTER** | **ca.** | **1/2** | **4/6** | **8 år** |
|---|---|---|---|---|
| **MATERIALER: Gjestal Nagano eller Silja Superwash.** | | | | |
| marineblått nr. 306 eller korallrødt nr. 346 | ca. | 1 | 1 | 1 nøste |

**Pinner:** Strømpep nr. 2½ og 3 eller 3½.
**Se oppskr. 127-2**



| **SKJERF** | **ca.** | **1/2** | **4/6** | **8 år** |
|---|---|---|---|---|
| **MATERIALER: Gjestal Nagano eller Silja Superwash** | | | | |
| marineblått nr. 306 eller korallrødt nr. 346 | ca. | 2 | 2 | 3 nøster |

**Pinner:** Rette p nr. 3 eller 3½.

**Marineblått skjerf:** Legg opp 68-72-76 m på p nr. 3 eller 3½ og str frem og tilbake i vrangbordstr med 2 r, 2 vr til arb måler ca. 76-80-84 cm. Fell av i vrangbordstr til en pen, jevn kant som ikke strammer. Knytt frynser i begge ender.
**Korallrødt skjerf:** Legg opp 69-72-75 m på p nr. 3 eller 3½ og str frem og tilbake i vrangbordstr med 3 r, 3 vr til arb måler ca. 76-80-84 cm. Fell av i vrangbordstr til en pen, jevn kant som ikke strammer. Knytt frynser i begge ender.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*




Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Thordur Thorsteinsson
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 68 46